# Rógvi farin á hestin

**Hóast onnur feløg hava sýnt áhuga, so verður vágbingurin framhaldandi á liðnum hjá Cycling Aarhus**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*

Eftir at veturin hevur syrgt fyri, at kappsúkklingin hjá Rógva Johansen hevur ligið lamin, er vágbingurin nú aftur farin undir kappingarnar.

Fyrsta kappingin í ár varð koyrd í Stjær, og var hetta ein sonenvd innleiðingskapping, sum felagið hjá Rógva skipaði fyri.

### Nøktandi úrslit

Rógvi greiður frá, at eftir hansara tykki var talan um eina sera hóskandi kapping, har súkklararnir sluppu at royna seg undir fleiri ymsum umstøðum.

Rógvi koyrir á elituliðnum hjá Cycling Aarhus, og fyri at vera við á hesum, er sjálvandi neyðugt at vera á toppinum so at siga alla tíðina. Allir súkklararnir á liðnum eru sáttmálabundnir, og hetta betrar sjálvandi um venjingarmøguleikarnar, men samstundis merkir hetta, at súkklararnir skulu taka lut í mest sum øllum kappingunum, sum eru í Danmark.

Um kappingina annars sigur Rógvi, at nógvur vindur var hendan dagin, og at hetta eisini sást aftur í súkklingini. Ein bólkur av súkklarunum slapp beinan vegin avstað, og tá Cycling Aarhus hevði ein mann við í hesum, varð uppgávan hjá Rógva og liðfeløgunum at syrgja fyri, at bólkurin ikki varð fangaður aftur av høvuðsfeltinum.

Tað eydnaðist tó einum útbroti at fáa fatur aftur á bólkinum, men tá Rógvi sjálvur eisini var við í hesum, tóktist alt kortini at vera, so sum tað skuldi.

Fyri Cycling Aarhus var endaliga úrslitið sera gott. Rógvi greiðir frá, at teir fingu eitt fjórða-, eitt áttanda- og eitt níggjuna pláss, og at teir eru stak væl nøgdir við hetta. Ikki minst tí kappingin taldi fleiri súkklarar, sum at kalla burturav satsa upp á fyrru hálvu av kappingini.


*Rógvi Johansen tykist nú av álvara at hava bitið seg fastan í danska súkklutoppin*

### Spennandi ár

Annars tykist árið í ár at gerast sera spennandi hjá Rógva, sjálvandi treytað av, at hann alla tíðina verður førur fyri at luttaka.

Rógvi greiðir frá, at teir hava eina sera strævna skrá, og millum annað skulu teir fyrst í mei mánaði koyra tvær stórar kappingar innan eitt vikuskifti.

- 5. mei skulu vit koyra Grand Prix Midtbank, sum er ein stór kapping, har teinurin er á leið 200 km til longdar, sigur hann.

Dagin eftir skulu vit koyra Samsung Mobile Grand Prix í Aarhus, har teinurin eisini liggur um teir 200 km. Hetta er annars ein av teimum heilt stóru kappingunum, og millum luttakararnar í kappingini verður millum fyrrverandi heimsmeistarin, Laurent Jallabert.

Annars er nú líkt til, at Rógvi veruliga hevur bitið seg fastan í danska súkklutoppinum, eftir at hann í fjør hevði eitt sera gott kappingarár. Fleiri lið hava víst áhuga fyri at fáa hann í part við sær, men eftir at hava umhugsað støðuna sera gjølla, hevur Rógvi kortini gjørt av, at verða verðandi hjá Cycling Aarhus, og hann leggur dent á, at hann er fegin um hesa avgerð.

# Lassin skal døma A-landsdyst

**Lassin Isaksen er fegin um fyrstu uppgávuna í eini HM-kapping**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*

Nú hevur Lassin Isaksen fingið sín fyrsta A-landsdyst í eini HM-kapping at døma. Talan er um dystin millum Liktinstein og Ísrael tann 2. juni.

– Eg eri sera fegin um hesa uppgávuna. Eg hevði vónað, at eg fór at fáa ein U21 landsdyst skjótt, so tí kemur hetta eitt sindur óvæntað, sigur Lassin Isaksen.

Lassin hevur verið altjóða dómari síðani 1996, og hesi árini hevur hann dømt fleiri enn 20 ungdómslandsdystir, hann hevur dømt í UEFA Cup kappingini, og hann hevur tikið sær av tveimum venjingardystum hjá A-landsliðum.

Hetta er fyrsta ferðin, at Lassin fær eina stóra uppgávu í HM-kappingini.

### Góð skoðsmál

Hvørja ferð ein altjóða dystur verður spældur, er tað onkur sum heldur eyguni við dómaranum og metir um avrikið.

Soleiðis hevur eisini verið í øllum dystunum hjá Lassin, og hóast hann ikki vil siga nakað um, hvussu skoðsmálini hava verið, mugu tey hava verið á eini leið, tá hann nú fær eina HM-uppgávu.

– Eg havi sett mær nøkur smá mál fyri framtíðina, og tað næsta var at fáa ein U21 landsdyst. Eg hevði ikki droymt um, at eg fór at fáa ein A-landsdyst í eini HM-kapping so skjótt, sigur Lassin.

Hann heldur ikki, at tað er stórt øðrvísi at døma eina A-landsdyst og ein ungdómslandsdyst.

– Umstøðurnar eru ymiskar, og tað er læruríkt, men tá tú fert á vøllin fyri at døma, ert tú akkurát líka konsentreraður í einum U-landsdysti sum í einum A-landsdysti, sigur hann.


*- Eg hevði ikki droymt um, at eg fór at fáa ein A-landsdyst í eini HM-kapping so skjótt, sigur Lassin Isaksen*

# Silkeborg bjóðar høvuðsstaðnum av

**Við sigrinum á Viborg mánakvøldið øktu teir um munin í toppinum til fýra stig**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Sunnukvøldið var Silkeborg fremst í superliguni – eitt stig frammanfyri FCK. Mánakvøldið var munurin øktur til fýra stig. Silkeborg hevði vitjan av Viborg, sum noyddist til hús aftur við 2–0 tapi. Hetta var størsta tapið hjá teimum í Silkeborg síðani í 1970.

At tað var heimaliðið, sum fór við øllum, høvdu teir í Viborg alla orsøk at vera misnøgdir við, og teir í Silkeborg kundu fyrst og fremst takka málverjanum hjá sær, Peter Kjær, fyri, at einki mál fór ígjøgnum.

Viborg spældi væl og ágangandi allan 1. hálvleik, og teir høvdu fleiri møguleikar at gera mal. Tí var tað køld pøs av vatni at fáa hjá teimum, tá Godwin Attram úr Ghana fýra minuttir undan steðginum setti hol á.

Eftir hvíldina royndi Viborg at trýsta, meðan Silkeborg dúvaði upp á skjót mótálop, og miðskeiðis í 2. hálvleiki øktu teir. Brian Pedersen var málskjúttin. Tað serliga við vinstrabeinta vongspælaranum er, at hann hevur verið skaddur í umleið eitt túsund dagar. Eftir tvær skurðviðgerðir í knænum er hann í vár komin fyri seg aftur, og tað verður sagt ikki at vera minst honum fyri at takk, at tað hevur gingið so mikið væl hjá Silkeborg, at teir eru klárt oddalið í superliguni.

Saman við Brøndby og FCK kappast Silkeborg um DM. Sunnudagin verður spennandi dystur í Brøndby, sum fer at fáa vitjan av Silkeborg.

# Støðan, danska superligan

| | | dystir | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Silkeborg | 21 | 11 | 8 | 2 | 34 | 24 | 10 | 41 |
| 2 | FCK | 21 | 10 | 7 | 4 | 35 | 19 | 16 | 37 |
| 3 | Brøndby | 21 | 11 | 3 | 7 | 51 | 28 | 23 | 36 |
| 4 | FCM | 21 | 10 | 6 | 5 | 39 | 32 | 7 | 36 |
| 5 | Lyngby | 21 | 11 | 3 | 7 | 34 | 34 | 0 | 36 |
| 6 | Viborg | 21 | 10 | 4 | 7 | 35 | 23 | 12 | 34 |
| 7 | OB | 21 | 9 | 3 | 9 | 33 | 27 | 6 | 30 |
| 8 | AaB | 21 | 8 | 6 | 7 | 34 | 32 | 2 | 30 |
| 9 | AGF | 21 | 7 | 2 | 12 | 29 | 43 | -14 | 23 |
| 10 | AB | 21 | 4 | 8 | 9 | 28 | 33 | -5 | 20 |
| 11 | Herfølge | 21 | 4 | 6 | 11 | 23 | 42 | -19 | 18 |
| 12 | Haderslev | 21 | 1 | 4 | 16 | 21 | 59 | -38 | 7 |




## Elduvíkar kommuna

Almennir kommunustýrisfundir verða á kommunuskrivstovuni í Funningsfjarðar Skúla, Funningsfirði, hesar dagar ár 2001:

30. apríl
21. mai
25. juni
27. august
24. september
22. oktober
26. november
17. desember

Allir fundirnir eru mánadag og byrja kl. 19.00.

## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til ein av kundum okkara, at byrja beinanvegin ella eftir nærri avtalu.

Arbeiðið fevnir um bókføring og lønarroknskap, umframt alt vanligt skrivstovuarbeiði.

**Førleiki:**
Útbúgving innan bókhald/skrivstovuarbeiði og ella royndir frá bókhaldsarbeiði/skrivstovuarbeiði er ein fyrimunur, eins og kunnleiki til nýtslu av teldu.

**Løn:**
Løn verður goldin smb. avtalu.

**Upplýsingar og umsókn:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Dianu Heinesen, tlf. 441666. Umsókn við avritum av møguligum prógvum skal sendast til Spf Grannskoðarastovuna, 480 Skála, innan 15/4-2001.

**Spf Grannskoðarastovan**
480 Skála
Tlf. 441666

## Ekspeditrisa m/k

søkist til hálvan dag at byrja sum skjótast.

**P/F FÓTBÚNI Tlf. 311705**

## Til sølu

Brúktur barrdiskur v/ kølidiski, borð, stólar og sofur til sølu hvør sær ella saman.

**Tlf. 219696**

## Kokkur

Søkt verður eftir kokki. Arbeiðstíðin er 160 tímar um mánaðin. Løn eftir avtalu.

**Tlf. 219696**

## Íbúðir/kømur søkjast

Søkt verður eftir húsum ella kømurum til næmingar á Almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri.

Áhugaðir útleigarar kunnu ringja á tlf. 372480 ella 371085 mánadag til fríggjadag millum kl. 9.00- 12.00 og 13.00- 16.00.

**Suðuroyar Kunningarstova**



**REYNI-SERVICE**

## Bilur við skaða til sølu

Til sølu er Ein Toyota Corolla 1.4 sedan 4 hurðar. Bilurin hevur skaða framman og verður seldur fyri hægsta boð yvir 60.000,- kr. sum hann stendur við skaða.

Skrásettur fyrstu ferð 27.03.2000
Km. 21.000

**P/F Reyni Service**
**Bilasølan**
tlf. 313040

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim**
**800 Tvøroyri**

## Húsavørður

Søkt verður eftir húsavørði at byrja 1. mai 2001.

Starvið umfatar alt fyrifallandi inni- og útiarbeiði. Starvið umfatar eisini smærri umvælingar, og er tað ein fyrimunur at umsøkjarin hevur handverkaraútbúgving.

Tá ætlanin framyvir møguliga verður at samanleggja starvið við ambulansutænastuna á Suðuroyar Sjúkrahúsi, er tað ein fyrimunur, at viðkomandi hevur ambulansuútbúgving, hetta er tó eingin treyt.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 13.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til fyristøðukvinnuna á tlf. 371666.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um starvsroyndir verða at senda til

**Suðuroyar Ellis- og Røktarheim**
Fyristøðukvinnan
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist er 19. apríl 2001**

## Teknari til Auto cad

Søkt verður eftir teknara til teknideild okkara.

Arbeiðið umfatar í høvuðsheitum fjølbroytt tekniarbeiði við nýmótans útgerð. Luttøka í øðrum arbeiði kann eisini koma upp á tal í mun til ta útbúgving og tann førleika, sum umsøkjarin hevur.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til telefon 314744.

**Landsbyggifelagið P/F,**
**Ráðgevandi Verkfrøðingar**
Postboks 228
Grønlandsvegur 5
110 Tórshavn

## Metaller købes

Jernbaneskinner + jernbanesveller sælges.

Henvendelse
**Leif Plougmann**
Tlf. 0045 40251787

## Halt feriu í Praag

Summarhús og íbúðir bíliga til leigu uttan fyri Praag.

Ymiskir prísir og støddir.

Áhugað kunnu ringja á tlf. 0045 98581719 ella 316800.

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

## Frítíðaravloysarar fyri portørar

Søkt verður eftir frítíðaravloysara fyri sjúkrahúsarbeiðarar (portørar) frá 12. juni til 31. august 2001.

Umframt koyring av sjúkrabili við vakt frá heimi umfatar starvið alt fyrifallandi inni- og útarbeiði, tað er tí ein fyrimunur, at viðkomandi umsøkjari hevur ambulansuútbúgving.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálstýrið og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir verður at senda til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

**Umsóknarfreist er 19. apríl 2001**